# Stokkholm



**00.00** - Ein stuttligur og strævin dagur er at enda! Um tú ikki hevur funnið tær eitt hotell, so er tað so avgjørt tíð til tað nú. Tað eru sera nógv hotell at velja ímillum, men um tú vil búgva eitt sindur annarleiðis og hampuliga bíligt, kann báturin "Af Chapman", ið liggur mitt í Stokkholm, verða eitt gott stað. Báturin liggur við kai alt árið og er vallaraheim um summarið.



**22.00** Nú er tú nær við Stureplan, ið er "The place to be", um ein vil í býin! Tað eru nógvir náttklubbar og diskotek at velja ímillum - eitt nú Spy Bar, Berns, Riche og Café Opera.




**19.00** Nú er hungurin komin, og tíð er at fáa sær ein góðan bita. Ein nyopnað matstova, ið hevur fingið nógv góð ummæli, er Pontus á Brunnsgatan 1.



**18.00** Nordic Light Hotell hevur eina sokallaða Ice Bar, har alt er gjørt av ísi - eisini gløsini. Tú verður ílatin tjúkka drakt, og so er bara at byrja kvøldið við at njóta ein góðan drykk.



**16.30** Kulturhuset liggur mitt í sentrum, og er mentunnarháborgin í Stokkholm. Her kanst tú síggja framsyningar, og oftani er onkur sjónleikur eisini at síggja. Børnini hava eina heila hædd fyri seg sjálvan at spæla í - "Rum før barn", eitur hon.






**14.30** Støkk inn á gólvið hjá kaffistovuni Vetekatten og fá tær ein "bulle" við kaffi.



**15.00** Nù er tú nær við tað stokkholmska "Strøget" nevliga Drottninggatan. Har eru allar tær stóru keturnar, Zara, H&M, Lindex, Indiska, JC millum annað.